

– Eg áni ikki, hví vit halda fram við at góðtaka tað og ikki tora at taka uppgerðina. Kanska lata vit vera at gera nakað, tí vit einfalt hava nøkur sjálvssøkin motiv. Vit vóna kanska, at vit gerast ein av teimum, sum enda við at fáa peningaliga ágóðan av hesum óskili. Kanska er tað óttin fyri tí ókenda. Møguliga er tað ein stokk konservativ bólkur í føroyska samfelagnum, sum hevur eina konservativa protestantiska áskoðan, sum byggir á, at tey ríku eru tey, ið eru mest vælsignað av Guði. Hetta sama mynstrið sóu vit millum jødarnar í gamla testamenti, har tey við tjúkkastu bankabókin vóru mett at vera mest vælsignað, sigur Ólavur Rasmussen.

Hann slær fast, at tað er bara fólkið í Føroyum, sum kann seta krøv um at demokratisera okkara rættindi í føroyska samfelagnum. Hann vísir á, at tað ikki ber til at tosa um, at vit øll eiga rættindini, tá veruleikin er, at tað einans eru nøkur fá, sum stýra øllum.

## Vandamikið gullasch

Bókin hjá Ólavi Rasmussen um danska heimspekingin Søren Kierkegaard, Antin – Ella, er í stóran mun ein uppgerð við trongdskygdan kristindóm. Júst trongdskygdi kristindómurin hevur sambært rithøvundanum veruliga fingið fastatøkur í Føroyum seinastu árini. Hann óttast serliga samanvavsturin av politikki og átrúnaði, sum er rættiliga sjónligur í føroyskum politikki í dag.

– Kjakið um rættindini hjá bøssum og lesbiskum eru góð dømi, har tú tekur moralskar spurningar og viðgerð teir politiskt og samstundis brúkar nýggja og gamla testamentið er ein ómetaliga vandamikil gullasch. Blandingurin av løgfrøði, politik og átrúnað hevur elvt til 100 ára kríggj í heiminum, og blóð hevur flotið í gøtunum í so nógvum litrum, at vit slettis ikki kunnu telja teir, sigur hann.

Ólavur heldur, at vandamikli samanvavsturin av politikki, løgfrøði og átrúnaði er nógv sjónligari í Føroyum, tí nú er ein politiskur flokkur, sum hevur sítt grundarlag í hesum samanvavstri. Presturin sipar í hesum føri til Miðflokkin.

– Tú hevur ikki hoyrt føroyskar politikarar áður nýtt og misnýtt kristindómin sum teir gera nú. Hesir politikarar síggja beinleiðis møguleikan at nýta kristindómin til at fáa politiskt vald. Tú hevur áður havt einstakar politikarar í teimum ymiskum flokkunum, sum hava roynt hetta, men ikki flokkar burturav, sum vilja hava vald og vilja brúka tað. Miðflokkurin fær politiskt vald upp á grund av Gudi, hugleiðir hann.

Spurdur, hví politikarar, sum nýta og misnýta kristnidómin verða valdir á Føroya Løgting, svarar hvalbiarprestur:

– Sekterisman í Føroyum er nógv sterkari í dag enn fyri nøkrum árum síðan. Somuleiðis er spjaðingin í føroyska fólkinum økt. Tá sekterisman økist, hevur tað við sær, at egoisman er veksur, tí egoisma og sekterisma er tað sama. Bæði egoisma og sekterisma hava bæði ein trongdskygdan máta at síggja veruleikan upp á. Úrslitið verður, at tú fært fólk, sum siga seg kenna tann æviga sannleikan, og tað er tað sama sum at taka einkarætt til at tulka tilveruna hjá øðrum menniskjum. Hetta er rein egoisma. Sekterisman leggur allan dent á, at tað eri eg, sum eri frelstur, tað eri eg, sum havi mítt uppá tað turra. Tað snýr seg ongantíð um heildina, um okkum øll. Tað snýr seg bara um tey innvígdu.

## Rasisma

Ólavur kallar tað, sum fer fram á politiska pallinum fyri reindyrkaða rasismu, og hesum mótmælir hann harðliga.

– Hetta er nógv verri enn erlig rasisma. At hata ein nekara tí at hann er svartur er ein erlig søk, tí at ein slík rasisma er grundað á býttleika og óvitan. Men at siga seg elska bøssan, men at hata hansara synd, hansara homoseksualitet, er ein ógvuliga besnissað rasisma. Serliga, tá ið ein vaskar sínar hendur í onkrum skriftstaði. Ja, í roynd og veru er tað Jesus, sum fær skuldina, hann sum segði, at vit ongan skulu døma.

Hann heldur, at í somu løtu vit sortera millum menniskju í Guðs navni gerst kristindómurin lívsfarligur. Eins farligur og islamisk ella jødisk fundamentalisma. Henda trongskygda fatanin hevur eftir hansara tykki einki við kristindómin at gera. Tvørturímóti oyðileggur henda fatanin trivnaðin, lívsgleðina og skapanargleðina. Ikki minst oyðileggur henda fatanin tilvitskuna um, at vit øll somul, hóast alt, eru í sama eksistentiella báti, slær Ólavur fast.

## Knúsa fólkakirkjuna

Hvalbiarprestur sigur seg brenna fyri uppgerðini millum trongdskygda kristindómin og meira verðsliga kristindómin í Føroyum. Hann ásannar, at henda uppgerð í stóran mun eisini skal takast innanhýsis í fólkakirkjuni. Hann skýrir teir ungu og nýggju prestarnar fyri at vera ógvuliga konservativar og umboða ein ein trongdskygdan kristindóm.

– Tað var O.K. Olofson, sum byrjaði hetta nýreligiøsa rákið í fólkakirkjuni. Tú sært serliga hetta rák rundan um Miðflokkin og nýggju prestarnar í dag. Hetta rák er við at drena næstrakærleikan úr kristindóminum. Eg eri bangin fyri, at teir sokallaðu modernaðu prestarnir við sínum miðaldarsjónarmiðum fara at oyðileggja og knúsa fólkakirkjuna og kristindómin. Fólkakirkjan má taka uppgerðina við hesi trongdskygdu sjónarmið, tí tað kann føra til ørskap um vit skulu fortelja hvørjum øðrum, hvør er verdur til at kalla seg kristnan. Eg ræðist hesa fundamentalismuna sum pestina, og eg ivist ikki í, at tað í stóru rørsluni brøðrasamkomuni eisini er ein djúp trongd eftir einum meira fólksligum kristindómi, fortelur hann.

– Men hetta skal standa fyri mína egnu rokning, leggur hann aftrat.

## Lívið margfalt

Ólavur Rasmussen heldur, at føroyingar eru við at vakna andaliga úr einum dvala. Hann vísir serliga á stóru undirtøkuna á kirkjuráðsvalinum í Havn og stóru undirtøkuna, sum hansara egna bók um Kierkegaard fær. Hann sigur seg vera sannførdan um, at fólk hava djúpa ræðslu fyri tí sum fer fram, og kirkjuráðsvalið var eitt gott dømi um eina uppgerð við trongskygda kristindómin í Føroyum.

*Hvørja fatan hevur Ólavur Rasmussen av kristindóminum?*

– Lívið er margfalt og vit eru øll ymisk og tað skulu vit viðurkenna og góðkenna. Vit skulu eitt nú góðtaka, at vit hava ymiska sexuella orientering, tí vit eru ikki øll skapt líka. Var tað nakað, Jesus gjørdi upp við, so var tað teir skriftlærdu og hesi um sitera skriftina sum grundarlag fyri, at tey kunnu koma við rasistiskum úttalilsum um okkara medmenniskju.

– Í kristnum týdningi er Jesus tann heilt stóri persónurin í mínum lívi. Eg livi ikki á nakran hátt upp til hansara krøv, men tað er júst poingið. Jesus segði tey meistarligu orðini, at eingin trýr so nógv sum tað lítla barnið. Hetta burdi givið okkum vaksnu, sum reypa okkum av okkara stóru trúgv, nakað álvarsligt og grundleggjandi at hugsa um. Uggin er, at Jesus elskar tað lítla barnið í okkum øllum somlum.

## Liberalur prestur

– Stutt fyri eg skuldi taka við prestastarvinum í Hvalba gekk sum rótasúpan, at kirkjan fór at gerast til eitt dansistað. Tá eg arbeiddi í SvF hevði eg nógvar vinmenn frá arbeiðsplássinum og mær dámar væl at fara í dans og fáa mær ein "sving om". Tað gjørdu vit nógv í Kagganum tá, og tá eg fái prestastarvið byrjar henda søgan at ganga í Hvalba. Tað er skjótt at verða fordømdur í Føroyum, men so skjótt tú andlit til andlits vísir hvør tú ert, hvørva fordómarnir. Harragud Páll, tíðirnar broytast. Vit sita beint nú á einum vertshúsi, Hafnia Lounge á Áarvegnum í Havn. Fyri nøkrum árum síðan trúði eingin, at Hafnia fór at fáa sær skeinkiloyvi. Vit sita her so friðarligir og fáa okkum ein kaffimunn og eitt prát. Vit hittast her, tí at her hittist fólk. So einfalt er tað.

Í føroyskum høpi verður Ólavur Rasmussen vanliga flokkaður sum ein liberalur prestur. Hann er fráskyldur einaferð og er ikki bangin fyri at vera sæddur á einum vertshúsi. Fyri mong verður hetta mett ikki at vera í samsvar við tann leiklut, vit føroyingar áleggja presti. Siðvenjan í Føroyum hevur verið at prestur traðkar varliga.

– Eg fái ikki so nógvar viðmerkingar fyri mín lívsstíl sum fyrr. Føroyingar eru sum onnur fólk, tá tað kemur til tey basalu tingini. Ert tú tann tú ert, góðtaka fólk tað. Um tú sum prestur byrjar at spæla ein dupultan leiklut, tí tú ert bangin fyri hvat fólk fara at siga, kemur tú sum menniskja í eini óhaldbara støðu. Havi eg hug at fáa mær ein dans, fái eg mær tað. Tað skal eingin blanda seg í og hatta tími eg ikki at krógva heldur. Fyri okkum prestar ger tað sama seg galdandi, sum fyri øll onnur menniskju. Sting fingurin í jørðina, har sum tú ert staddur, men sting hann ikki so djúpt, at tú missir teg sjálvan burtur, sigur Ólavur Rasmussen.

”

*– At hata ein nekara tí at hann er svartur er ein erlig søk, tí at ein slík rasisma er grundað á býttleika og óvitan. Men at siga seg elska bøssan, men at hata hansara synd, hansara homoseksualitet, er ein ógvuliga besnissað rasisma*



*–Tú hevur ikki hoyrt føroyskar politikarar áður nýtt og misnýtt kristindómin sum teir gera nú. Hesir politikarar síggja beinleiðis møguleikan at nýta kristindómin til at fáa politiskt vald. Miðflokkurin fær politiskt vald upp á grund av Gudi, sigur hvalbiarpresturin*